gult cyan magenta svart



**EG MEINI TAÐ**

# Kvinnurnar standa makliga í baksýni

SJÓNARMIÐ
*Elin Heinesen, vevstjóri á www.kvindekanalen.dk*

Kvinnudagurin 8. mars nærkast og trongdin at gera støðuna upp. Hvussu er støðan hjá konufólkunum í ár 2001 - ella hjá "kvinnunum", sum vit kalla okkum í dag eftir íblástri frá hinum norðanlondunum? Eru vit meira javnsettar í dag í mun til menninar, tá vit tosa um, hvør ið hevur maktina í samfelagnum? Ikki heilt, um vit hyggja at hagtølunum, har menn enn sita rimmarfastir í stjórasessunum bæði í vinnulívinum og í tí almenna - serstakliga í Føroyum.

Her skal ein hugbroyting til, um kvinnur eisini skulu hava vilja til at taka teirra part. Í øldir, ja, ártúsundir, aftraðu kvinnur seg við at taka maktina, tí tað merkti, at tú eisini skuldi taka ábyrgdina - eina ábyrgd, sum kanska merkti, at tú av og á mátti traðka onkran á tærnar. Og við innbygdu instinktunum fyri umsorgan og ótta fyri at gera øðrum ilt, so lótu kvinnurnar maktina til onnur - til mennninar. Teir vóru jú passaliga "líkasælir", og tað er jú ein góður eginleiki, tá illa umtóktar, men neyðugar avgerðir skulu takast. Og so kundu kvinnurnar standa so makliga í baksýni og havast at teim neyðars monnum - hesum kensluleysu bakbeistunum!

Kvinnurnar mentu ístaðin loynibrøgdini og bakbítingina - og tað var nú ikki stórt betri, tí tað hevur hingið við myndini av, hvussu nógv uppfata kvinnur líka síðan. Aftanfyri vakra óseka andlitið eru tær svikaligar sum slangur, og bara úti eftir at lumpa og tosa ilt um fólk! Ella... fari eg skeiv? Teir klóku menninir settu kvinnuna uppá ein piedestal. Teir lósu alt tað góða og reina inn í kvinnuna, tí teir kundu jú ikki vera hennar umsorgan fyri uttan.

Umsorganina, sum kvinnurnar vístu sum møður fyri børn teirra og felagar í húski og song. Kvinnurnar kundu so sóla sær í hávirðingini og gjalda við at lata maktina frá sær, meðan menninir afturfyri gleðiliga átóku sær leiklutin sum bakbeistið. Her funnu kynini eina javnvág - leingi.

Men so komu kvinnurnar av ymsum orsøkum út á arbeiðsmarknaðin og upplivdu heilt aðrar lívstreytir, tá tær fóru at forvinna sær egnar pengar. Knappliga vaknaði hugurin at siga hart, hvat hugsað var, tí nú kundi tað gerast rímiliga ókeypis. Kvinnurnar upplivdu fyrimunirnar við at forsyrgja sær sjálvum og hava ávirkan á egna lagnu. Tær smakkaðu eitt sindur av maktini, og fingu hug til meira.

Tað - at "taka makt" – hevði fyrr ein ótespiligan dám av maktgirnd, kúging - og í síðsta enda kanska kríggi, deyða og oyðilegging. Hetta var í øllum førum ikki roknað at vera feminint, men hoyrdi til verðina hjá monnunum – varð hildið. Og kvinnurnar aftraðu seg tí við at "taka makt", tí tær vildu jú ikki vera ódámliga ókvinnuligar og bakbeistakendar. Í dag, har okkara partur av verðini er rímiliga friðarligur, seta vit hugtakið "makt" meira í samband við "at hava ávirkan". Ávirkan á verðsins gongd. Og hví skulu kvinnurnar ikki eisini hava ávirkan á verðina, sum er helvtin teirra? Í dag er makt ikki longur sama tabu millum kvinnur. Tey ungu hava nú í nøkur ár tosað um "Girl Power". "Ein máttmikil kvinna" ljóðar ikki so galið - nógvar ungar kvinnur eru ikki bangnar fyri at vera tað... uttan at tær missa kvinnuligu eyðkennini fyri tað.

Men um kvinnur í størri tali skulu seta seg í stjórasessirnar, hava tær so møguleikan fyri at fáa tann stuðulinum, sum menninir nutu gott av so leingi frá kvinnunum, og sum gjørdi tað møguligt hjá teimum at hava maktina?

Menninir hava jú enn nóg mikið um at vera á karrierustiganum, so teir hava ikki so góða tíð at vera heima og vera til hjálpar har. Og ber til bara at býta um? Og hjá kvinnunum at sleppa umsorganaruppgávurnar, sum mest hava verið teirra øki so leingi?

Nei, tað snýr seg kanska ikki so nógv um at berjast um, hvør skal gera hvat, ella at ávísa órættvísi longur - at vera vreiðir reyðsokkar móti monnunum, sum nakrar kvinnur í undanfarnu ættarliðunum vóru - nei, latið menninar fáa frið og hyggið at møguleikunum í nýggju verðini heldur enn avmarkingunum.

Seinastu árini hevur eitt nýtt fyribrygdi tikið seg upp, sum fer at kollvelta alt: Alnótin! Alnótin er samskifti, og samskifti er "makt" í dag. Alnótin ger nógv møguligt, vit fyrr bara kundu droyma um. Á alnótini ber til at ferðast um allan knøttin við ljósferð og fáa kunning um, hvat sum helst og at samskifta við onnur hinumegin knøttin alt fyri eitt, um tað skal vera. Alnótin broytir tí grundarleggjandi okkara samfelagsskipanir og arbeiðshættir og ger tað t.d. møguligt at samskipa familju- og arbeiðslív á heilt annan hátt enn áður.

Hetta kann vísa seg at gerast ein stórur fyrimunur - serliga hjá kvinnum! Og her liggja kanska spennandi óvæntaðir møguleikar fyri at gera sína ávirkan á samfelagið og livivilkorini á ein hátt, sum eingin kundi fyrigyklað sær fyri bert ártíggjundum síðan.

# Nýtið móðurmálið – eisini í vikuskiftinum

UMMÆLI
*Birgir Kruse*

At nýta móðurmálið er sjálvsagt. Hvat annað er okkum givið? Men ikki er tað altíð so sannlíkt, ella av eini og hvørji orsøk upplagt, at brúka móðurmálið. Eitt nú innan tónleik. Tann partin av tónleiki, vit rópa popp ella rokk. Sjálvt tá popparar yrkja og syngja um innastu kenslur, velja teir ofta enska málið. Tað er ein vágin gerð. Serliga, tá enska tungan ikki er teirra egna. Tá kunnu undarligar krúllur koma upp í millum. Eitt er framburðurin og førleiki okkara at skilja hann. Til dømis, tá Jimi Hendrix sigur »Excuse me while I kiss the sky« og ein ummælari skilir tað sum »Excuse me while I kiss this guy«. Ella tá Dan Turell fegnaðist um vendingina hjá Lou Reed »Set a light of love«. Seinni kom hann eftir, at orðini vóru »Sattelite of Love«.

Umframt framburðin og førleikan at skilja, eru tað eisini tær málsligu myndirnar, sum yrkjarin ikki hevur ræði á. Málið, sum er fremmant, verður ikki longur tænari og natúrligi miðilin, men eitt haft um málsligu beinini. Og tá kann stevið so lættliga fara av lagi. Tí vil eg mæla øllum til at nýta móðurmálið. Eisini Kim Larsen. Tí enskt dugur hann ikki. Men tó velir hann tað. Á nýggju fløguni »Weekend Music« (Medley 2001).

Ein dáragerð hjá einum manni, sum framman-undan eigur tað danskt mæltu plátu, sum flestu landsmenn hansara vilja ogna sær. Tað er »Midt om natten« frá 1983, sum er seld í 600.000 eintøkum.



*Nýggja fløgan hjá Kim Larsen og Kjukken eitur "Weekend Music". Eitt vána avrik hjá Larsen, sum hevur uppiborið støðumetið 00, heldur Birgir Kruse. Báðir eru teir fyrrverandi lærarar, so helst vit teir, hvat teir tosa um*

Hevði hin góði Kim hildið ensku royndir sínar inni við seg sjálvan, so var eingin skaði hendur. Men nú hann gevur út nýggja fløgu, trínir hann á almenna pallin. Og har er eingin náði. Og skal heldur ikki verða tað.

Eftir at hava lurtað eftir hesi nýggju fløgu eitt heilt vikuskifti, sum bæði eitt og annað heiti leggur upp til, so noyddist eg at kaga í gomlu lærarabókina. Fyri at fáa fast undir føti og finna eitt støðumet. Geva karakter, sum vit siga á móðurmálinum.

Ovasta metingin, sum gevur besta karakterin, er grundað á eitt framúr sjálvstøðugt og avbera gott avrik. Tað er tað ikki, avrikið hjá Kim. Renni eyguni og fremstafingurin niður eftir talvuni og støðgi við 03, sum verður givið fyri sera ivasamt og ófullfíggjað avrik. Kanska. Men tá eg síggi grundgevingina fyri allar niðasta karakterin, 00, haldi eg, at hann er rættastur.

Próvtalsstigin er ikki ókendur í hugaheimi Kim Larsens. Hann er sjálvur lærari. Men eyðsæð er, at hann leggur líka í málsliga partin av øllum lærdómi. Her heima hjá okkum rópa vit nakað »gøtudanskt«. Í Danmark rópa tey nakað »Valbyengelsk«. Henda útgáva, »Weekend Music«, sum er eitt skilaleyst bland av málsligum svassi, uttan nakra sum helst fynd, leggur upp til eitt hugsað »Larsenengelsk« ella »bredflabengelsk«. Kanska er tað Esperanto eftir høvdinum hjá Larsen, lærara. Stórt spell. Stóri taparin er ikki Larsen, men móðurmálið.

*Kim Larsen: »Weekend Music« (Medley 2001)*




*Fyrsta singelplátan hjá Gasolin', har Kim Larsen var sangari. Hon var á enskum og nevndist "Johnny the Jackpot"(CBS 1971). Síðani legði Kim Larsen seg eftir móðurmálinum og bleiv ein klassikari, sum slapp í sangbøkur, ájavnt við til dømis Benny Andersen. Kim Larsen signeraði fyrstu plátuna hjá Gasolin' síðst hann var í Føroyum og helt konsert.*

# Ivor Novello



*Ivor Novello – mikudagin eru fimti ár síðani hann doyði, 58 ára gamal*

VIRÐISLØNIR
*Birgir Kruse*

Í hesum døgum, har mangt snýr seg um virðislønir, antin tær so eita Grammy, Prix ella annað, eru nett fimti ár liðin síðani Ivor Novello doyði. Hann var bretskur tónasmiður og filmsleikari, sum doyði 58 ára gamal hin 7. mars 1951.

Fulla navna hansara var Ivor Novello Davies og hann varð føddur í Cardiff í Wales hin 15. januar 1893. Í bretskum bókum verður hann umrøddur sum "a matinee idol of the British stage".

Kendasti sangur eftir Novello er heimlandssangurin "Keep the home fires burning". Umframt sangir, fekst Novello eisini við leikir á palli, bæði skemtileikir og sangleikir. Millum leikir hansara eru "The truth game" og "Symphony in two flats" frá 1929.

Á hvørjum ári verða vit mint á arvin eftir bretska Ivor Novello. Tað er tá ið árliga virðislønin The Ivor Novello Awards verður latin. Næstu ferð hetta hendir er hin 24. mai í ár. Tá hava hesar virðislønir verið handaðar 46 ár á rað.

Tá Ivor Novello virðislønirnar vórðu latnar hin 25. mai í fjør fekk Paul McCartney serliga virðisløn handaða frá Sir Tim Rice, sum er forseti í virðislønarnevndini. Virðislønin var fyri tónleikavirksemi á høgum støði í fýra ára tíggju.

Besti modernaði sangur var "Why does it always rain on me", sum Fran Healy yrkti og bólkurin Travis framførdi. Besti sangur, tá umræður tónleik og orð, best song musically and lyrically, var tó "Strong" hjá Robbie Williams.

Tað er bretski felagsskapurin, sum verjir rættindi hjá listafólkum, The Performing Rights Society, sum fíggjar árligu Novello-handanina.

Vikuskifti

Postboks 19, 110 Tórshavn, telefon 311820, telefax 314720,
teldupostur: birgir@sosialurin.fo
Blaðstjórn: Birgir Kruse

gult cyan magenta svart



**PRIX VINNINGURIN. Nú er greitt, hvør vinningur verður latin vinnandi bólkinum í Prix Føroyar kappingini. Tað verður eitt uppihald á donskum bóndagarði, har allir nútímans møguleikar eru fyri góðum tónleikaupptøkum. Og so at halda frí eisini. Mentamálastýrið borgar fyri hesum frágera upplivilsi á jútsku heiðini**

# Vegurin til Vejen

PRIX FØROYAR
*Birgir Kruse*

Fá eru tey tiltøk, sum hava sett sovorðið lív í, sum Prix Føroyar. Og skapt eitt sovorðið virksemi á rútmiska tónleikaøkinum. Tað er at frøast um. Tí ein sannroynd er tað, at stórt virksemi á einum heimligum mentunarligum øki, heilt vist smittar av og nørir um virksemi av øðrum slagi. Virksemi, sum onkursvegna knýtir seg afturat tí reint pallborna tónleikavirkseminum. Hetta eru naglar í jarðarinnar húsi. Naglar, ið eru við til at definera okkum sum tjóð.

Fróði Vestergaard, sum í Norðurlandahúsinum samskipar stóra tiltakið, upplýsir, at nú er greitt hvør høvuðsvinningurin verður. Tað verður eitt frágera uppihald á garðinum hjá Lundgaard og teimum í Vejen í Jútlandi. Eitt frágera navn, eisini – Vejen. Hetta er vegurin, hjá vinnandi føroysku Prixstjørnunum í ár. Úr Føroyum og út til alheimin. Kanska. Tí tað er eitt drúgt stríð at náa áhoyrarar, spælistøð og plátufeløg. Tað kunnu tey bæði Lena og Niclas boða frá úr Kanada.

Úr Vancouver í Kanada heilsar Niclas Johannessen annars, og sigur, at hann er um at verða liðugur at produsera eina plátu við einum kanadiskum sangara, sum Óli Poulsen skal ljóðblanda.

»Tað er eisini um reppið, at Lena og eg fáa ein sáttmála við eitt útgávufelag í Los Angeles«, sigur Niclas. »Tvey løg, at byrja við«, sigur hann um meylin.

»Lena er harafturat biðin um at spæla til eitt vælkent konserttiltak, ið kallst *Girls With Guitars*. Tað verður um tvær vikur og er ógvuliga vælumtókt her í Vancouver. Og seinni, helst í mai, skulu vit verða við í einum *showcase* tey rópa, so jú, nógv jørn eru í eldinum«, sigur Nicals.

Higartil hava tey bæði Lena og Niclas verið í Kanada í fimm mánaðir. »Tað tekur tíð at byggja upp sambond og netverk«, siga tey. »Tað er sum alt annað; skal tað eydnast, so er umráðandi at hanga í og arbeiða málrættað.«

Á sama øki er Teitur Lassen eisini virkin. Longu í Mark No Limits gjørdi hann vart við sínar framúr gávur. Hann er farin til USA, har hann áður hevur roynt seg, men hesaferðina hevur hann donsku Sashu Dupont við sær. Tað er hon, sum leikar klaver í donsku undirhaldsendingini *Hit med sangen* hjá Amin Hansen. Eitt annað samband, sum Sasha eisini hevur til Føroyar og føroyingar er, at hon hevur gingið á skúla saman við Hans Peturi í Brekkunum.

Øll eru hetta nøvn, sum eru knýtt at søguni um Prix Føroyar. Ikki einans, sjálvandi, men givið er, at hetta tiltak, sum gongur út frá Norðurlandahúsinum, hevur sett ferð á og skapt møguleikar hjá hugaðum og gávuríkum tónleikarum á rútmiska økinum. So spennandi verður, hvør fer avstað við sigrinum hin 21. apríl. Tann vinnarin hevur so í hvussu er fingið gøtuna greidda – til Vejen. jútska garðinum.



*Her skal vinnandi bólkurin spæla sær: í studio 1 hjá Lundgaard fyritøkuni, sum hevur frágera karmar og útgerð til bestu upptøkur*

**VIRÐISLØN. Edward Fuglø er í uppskoti at fáa norðurlendsku barnabókaheiðurslønina fyri árið 2001. Tað hevur føroyska Skúlabókasavnsfelagið gjørt av**

# Edward í uppskoti til virðisløn

BARNABØKUR
*Birgir Kruse*

Á flestu størri skúlum her heima, eins og í norðurlendsku grannalondum okkara, eru skúlabókasøvn. Millum tey, sum har starvast, er samstarv sum rópast Norðurlendsku skúlabókavarðarfeløgini, ella Nordisk Skolebibliotekar forening.

Hetta samstarv tekur á hvørjum ári ímóti uppskotum úr ymsu londunum til eina árliga heiðursløn, nevnd nordisk børnebogspris. Heiðurslønin verður latin einum skrivandi rithøvundi ella einum persóni, sum hevur myndprýtt eina barnabók.

Við í hesum norðurlendska samstarvi er eisini Føroya Skúlabókasavnsfelag. Føroyskir nevndarlimir í hesum felagi eru Solveig Debes, Poulina Slættanes og Gunnvør Joensen, sum eisini umboðar Føroyar í skipaða norðurlendska samstarvinum.

Úr Føroyum hava tær tríggjar tikið stig til at innstilla listamannin Edward Fuglø til árligu virðislønina. Ein tilmælingarnevnd er sett og hon grundgevir soleiðis fyri uppskotinum:

»Edward Fuglø hevur brotið upp úr nýggjum, tá talan er um at gera myndir til barnabøkur. Ævintýrkendu myndir hansara við nógvu smálutunum, nema við hugflogið og forvitnið hjá barninum.

Eisini dugir og skilir Edward at fáa mynd og tekst at hanga saman og skapa eina heildarmynd í hugaheimi barnsins. Edward Fuglø hevur eisini hegnisliga myndprýtt fakbøkur, og vísir, serstakliga í bókini *Villini súgdjór í Útnorði*, at hann innan fakliga myndagerð er framúrskarandi.

Í fleiri førum hevur Edward eisini gjørt scenografi til barnaleikir. Nevndin heldur tað vera rætt at taka fram pallmyndina til barnaleikin *Pippi* eftir Astrid Lindgren. Her hevur listamaðurin skilt at gera eina mynd, sum er framúr á tann hátt, at tað kennist sum at blaða í eini myndabók, tá tú sum áskoðari situr í Sjónleikarhúsinum og sær leikin. Tekstur og mynd eru í hesum føri so nær knýtt hvør at øðrum, at leikurin verður verandi í hugaheiminum langa tíð eftir loknan leik«.

Edward, sum er 35 ára gamal, er útbúgvin á Skolen for Brugskunst í Keypmannahavn 1991.

Av Sosialinum ynskja vit Edwardi tillukku og góða eydnu við tilnevningini, sum vit – óneyðugt at siga – halda er ruddiliga uppborin. Serliga tá vit hugsa um framúr hegni Edwards at skapa brýr millum listirnar og eisini aldursbólkarnar.

Serliga væleydnað kemur hetta til sjóndar í bókini *Veingjaða myrkrið* (BFL 2000) har søga William Heinesens verður sett í eitt egið, ófrættakent ljós, fyri børn í øllum aldri.

Eisini er vert at nevna bókina *Bókstavirnir* hjá Sigurði Joensen, sum Edward myndprýddi í 1995. Ein bæði stuttlig og hugvekjandi bók, sum tykist mest sum burturgloymd. Hetta er ein bókstavabók til byrjunarundirvísing í skúlunum, sum Bókadeild Føroya Lærarafelags gav út.

Um mánaðarskiftið juni juli verður norðurlendsk ráðstevna fyri skúlabókavørðar í Føroyum. Tá skulu ymsu umboðini hittast og gera av, hvør fær norðurlendsku barnabókavirðislønina í ár. Hóast avgerðin fellir herheima og í summar, verður virðislønin ikki handað fyrr enn í heyst, tá bókamessa verður í Gøteborg í Svøríki.

*Edward Fuglø við hundinum heima í stovuni í gomlu Sýslumanshúsunum í Klaksvík.*
*Mynd: Jens K. Vang.*

